LM-004/2023

Tórshavn 6.juni 2023

Umhvørvismálaráðið

Att; Jóannes N. Dalsgaard

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um broyting í arbeiðsskaðatryggingarlógini - *javning av framhaldandi árligari veiting av endurgjaldi fyri mist vinnuføri, og áseting um, at endurgjaldsveiting í seinasta lagi endar við fólkapensjónsaldur*

Víst verður til áheitan Umhvørvismálaráðsins um at gera viðmerkingar til nevnda uppskot til lóg.

Fakfelagssamstarvið tekur undir við teimum broytingum, sum uppskot Umhvørvismálaráðsins miðar eftir at gera í arbeiðsskaðatryggingarlógini:

- at útgjøld fyri mist vinnuføri eftir § 50 í lógini verða javnað, smb. § 43
- at veitingarnar verða synkroniseraðar við lógarásetta fólkapensjónsaldurin

Fakfelagssamstarvið heldur annars, at ein broyting afturat átti at verið gjørd í § 50.

Her hugsa vit um § 50, stk. 2, sum í dag er soljóðandi:

> *§ 50, stk. 2. Tann árliga veitingin verður goldin tryggjaða mánaðarliga frammanundan, og útgjaldingin byrjar, tá avgerðin er tikin, uttan so, at serligar umstøður tala fyri einum øðrum byrjanartíðarskeiði.*

Viðgerðartíðin av slíkum málum kann vera drúgv, og vit halda, at tað er skeivt, at tað kann vera ein fíggjarligur missur fyri tann skadda.

Vit skjóta tí upp, at § 50, stk. 2 verður orðað soleiðis.

> *§ 50, stk.2. Tann árliga veitingin verður goldin tryggjaða mánaðarliga frammanundan, og útgjaldingin byrjar, tá avgerðin er tikin, og samstundis verður endurgjald fyri tíðina frá skaðadegi fram til avgerðardag eftirgoldið í einum.*

Alternativt:

> *§ 50, stk.2. Tann árliga veitingin verður goldin tryggjaða mánaðarliga frammanundan, og útgjaldingin byrjar, tá avgerðin er tikin, og samstundis verður endurgjald fyri tíðina frá umsóknardegi til avgerðardag eftirgoldið í einum.*

Meira alternativt:

> *§ 50, stk.2. Tann árliga veitingin verður goldin tryggjaða mánaðarliga frammanundan, og útgjaldingin byrjar, tá avgerðin er tikin, og samstundis verður endurgjald fyri tíðina áðrenn av avgerðardag eftirgoldið í einum eftir reglunum í § 32, stk. 1 í løgtingslóg um almannapensjónir*

Fakfelagssamstarvið